VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Eitt álvarsamt mál

Í blaðnum í gjár nam stjórnmálafrøðingurin Bogi Eliassen við eitt álvarsamt samfelagsmál, nevniliga hetta, at so nógv útbúgvið fólk verður verandi uttanlands. Stjórnmálafrøðingurin sigur, at stórur partur av teimum, sum fáa útbúgving, fer av landinum. Hesi koma minni enn so øll aftur til Føroya. Víst verður til, at fráflyting er eitt vanligt fyribrigdi í smærri og fjarskotnum samfeløgum, og dømið Hetland verður nevnt. Greinskrivarin nevnir eisini kanningar, sum hava víst, at Føroyar hava tørv á fleiri lærdum fólkum, samstundis sum staðfest er, at ein stórur partur av útisetunum, sum nevnt ikki kemur aftur til Føroya. Í hesum sambandi vísir frøðingurin til Jobmatch, sum er ein sera áhugaverd og seriøs roynd at broyta hetta óhepna mynstur.

Vit eru vorðin partur av altjóðasamfelagnum og skulu Føroyar menna seg og verða kappingarførar mótvegis útheiminum, er eisini neyðugt at menna samfelagið. Hetta merkir, at samfelagið skal kunna bjóða borgarunum áhugaverd størv og eitt umhvørvi, sum hesir vælútbúnu útisetar vilja búgva í. Her krevst ein felags startegi til tess at menna okkara samfelag og til hetta krevst eitt nú, at vit finna okkara serligu styrkir og menna tær. Hetta eru sera áhugaverd sjónarmið, sum allar avvarðandi partar eiga at taka til sín og umhugsa, tí eitt samfelag sum okkara tolir illa tað braindrain, sum nú fer fram.

Stóri spurningurin er, hvussu hesin trupulleiki verður taklaður í praksis. Hvat skal heilt ítøkiliga til? Bogi kemur við nøkrum áhugaverdum dømum, samstundis sum hann ger vart við, at tað er neyðugt at ásanna, at alheimsgerð merkir altjóða kapping um bestu starvsfólkini. Tað skal ikki nógv hugflog til at staðfesta, at hvørki tað almenna ella tað privata í Føroyum í nóg stóran mun hava fatað hetta, enn minni tikið avleiðingarnar av hesum nýggja veruleika, ið er skaptur av altjóðagerðini.

Tað er henda trupulleika, sum tiltakið Jobmatch tekur fatur í. Hugmyndin er eitt nú, at skulu Føroyar menna seg til at verða millum fremstu lond, er avgerandi neyðugt, at Føroyar eisini megna at draga til sín fólk við útbúgving. Ein orsøkin til trupulleikan er sjálvur bygnaðurin ella struktururin í okkara útbúgvingarskipan. Fjarstøðan millum tey lesandi og føroyskar arbeiðsgevarar er stór, lestrarumhvørvið er framvegis mest Danmark og hetta ger, at tey lesandi ikki eru partur av føroyska samfelagnum, meðan tey útbúgva seg. Høvuðsmálið við Jobmatch er at sameina arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar. Føroyskar fyritøkur og tað almenna eiga at bjóða seg fram sum arbeiðspláss og málbólkurin er føroyingar í Danmark og útlendingar, sum kundu hugsað sær at arbeitt í Føroyum.

Tað er stórur tørvur er á einum tiltaki sum Jobmatch, ið kann lýsa arbeiðsmarknaðin fyri útisetum og eggja teimum at koma heim. Í hesum sambandi verður víst á tørvin at gera serritgerðir fyri føroyskar fyritøkur og fyri tað almenna, ein leið, sum onnur samfeløg við somu trupulleikum hava roynt við góðum úrslitum. Tað er tí at vóna, at Jobmatch fær góða undirtøku frá vinnuni eins og frá tí almenna – og ikki minst brúkarunum. Hetta er eitt av fleiri góðum initiativum til tess at bøta um ein álvarsaman samfelagstrupulleika, nevniliga at vitanarsamfelagið krevur nógv vælútbúgvið fólk við nógvum ymiskum førleikum.

Sosialurin

Altjóða viðurkendar mannagongdir og so Kjartan Hoydal

HJALTI Í JÁKUPSSTOVU

Formaðurin í Fiskiorkunevndini, Kjartan Hoydal, hevur í seinastuni verið frammi við eini rød av illa grundaðum álopum á Fiskirannsóknarstovuna og virki stovnsins. Kjartan Hoydal er vælkomin at hava sína hugsan um arbeiðið og úrslitini hjá Fiskirannsóknarstovuni, men neyðugt er at gera vart við, at stovnsmetingarnar hjá Fiskirannsóknarstovuni á hvørjum ári verða góðskumettar av altjóða havransóknarfelagsskapinum ICES, har heimsins fremstu fiskifrøðingar eru savnaðir.

Álopini frá Kjartani Hoydal taka sína byrjan hesuferð, tá ið Fiskiorkunevndin í mars bað um tøl frá Fiskirannsóknarstovuni eftir sama leisti, sum roknað varð eftir í 1995. Fiskirannsóknarstovan svaraði nevndini beinanvegin, at tað lat seg ikki gera. Fyrst og fremst vóru sambærilig hagtøl ikki til og í øðrum lagi var tað eitt so umfatandi arbeiði at fáa hagtølini til vega, at tað hevði kravt at Fiskirannsóknarstovan var noydd at leggja annað týðandi arbeiði niður, eitt nú stovnsmetingar og yvirlitstrolingar.

Formaðurin ger sína egnu frágreiðing

Men 6. juni 2008 letur Fiskiorkunevndin sína frágreiðing úr hondum. Frágreiðingin er ikki einmæld. Kjartan Hoydal er eftir øllum at døma ikki nøgdur við frágreiðingina, sum hann hevur havt ábyrgdina av at lata úr hondum.

17. juli 2008 letur hann eitt ískoyti til landstýrismannin í fiski- og tilfeingismálum, har hann sjálvur hevur roynt at rokna út støðuna í dag í mun til í 1996.

Tað stendur ikki greitt, um tað er nevndin, sum stendur aftanfyri ískoytinum, ella um tað er formaðurin sjálvur, sum skrivað hevur. Men í øllum førum er ískoyti fyrst og fremst eitt álop á Fiskirannsóknarstovuna, bygt á illa lýstar útrokningar.

Kjartan Hoydal kemur, um eg skilji frágreiðingina rætt, til at Fiskirannsóknarstovan í stóran mun hevur rætt, og serliga tá tað snýr seg um toskin. Men samstundis kemur Kjartan Hoydal til, at tað má verða tí, at tølini frá Fiskirannsóknarstovuni eru ov vánalig.

Altjóða góðskumettar stovnsmetingar

Høvuðsorsøkin til, at Fiskirannsóknarstovan velur at lata stovnsmetingarnar gera gjøgnum ICES, er at arbeiðið verður góðskumett av teimum fremstu fiskifrøðingunum í øllum ICES limalondunum, sum kritiskt gjøgnumganga stovnsmetingarnar, hvør hjá øðrum.

At Kjartan Hoydal heldur seg kunna gera arbeiði betur enn altjóða havrannsóknarstovnurin, er hann vælkomin til. Men altjóða trúvirði á, at tilmælini, sum Fiskirannsóknarstovan kemur við, eru góðskutryggjaði, er av størri tyngd, enn hvat Kjartan Hoydal heldur um Fiskirannsóknarstovuna, og hvussu hon skal arbeiða.

Fiskidagaskipanin má stillast eftir fortreytunum

Fiskidagaskipanin miðar eftir at fiska ein burðardyggan part av fiskastovnunum hvørt ári, og er tí einki øðrvísi enn ein kvotaskipan. Vit eiga tí at nýta hesa skipan út frá sínum fortreytum. Millum aðrar er hesin sannleiki, at býtið millum bólkarnar er broytt, at veiðibólkarnir eru broyttir, at veiðitøkni er broytt, og tí er alt annað líka eisini fiskiorkan vaksin munandi. Fiskirannsóknarstovan kann bert rokna út, hvussu stórur tann mest sannlíki fiskideyðin er, og hvussu hesin stendur í mun til tað, stovnurin ber. Og tað er tað, vit eftir førimuni gera.

Øll inntriv í fiskidagaskipanina, t.d. at loyva vøkstur í talum av línuskipum, loyva trolbátum at verða longdir, geva lemmatrolararnum hjáveiðikvotur o.s.frv., skeikla skipanina frá tí, hon var, og hon kemur ikki aftur til tað, um enn so roynt verður.

Ein og hvør sunn vinna vil og skal altíð gerast meira effektiv, og soleiðis eisini fiskivinnan. Um so ikki var, royndu vit enn við ongul og steini. Tá tilfeingið er avmarkað, er neyðugt, um vinnan skal verða sunn, at loyva effektivisering, men samstundis má samlaða veiðiorkan minkast tilsvarandi.

ICES tilmæli eftir føstum leisti

ICES ger tilmæli fyri ein hóp av fiskastovnum fyri alt ICES økið eftir meira ella mini føstum leisti.

Í hesum verður serliga hugt eftir, hvussu nógv er til av gýtingarførum fiski (gýtingarstovnurin) í mun til miðal, og útlitini fyri tilgongd og vøkstur.

Verður mett, at gýtingarstovnurin er so lítil, at vandi er fyri, at hann bert kann geva undir miðal í tilgongd, mælir ICES til, at fiskiskapurin eftir hesum stovni heldur uppat, ella verður so lítil sum praktiskt gjørligt. Er gýtingarstovnurin eitt sindur betur fyri, men tó lítil, og fiskiskapurin harðari enn stovnurin hevur tolt í miðal, verður mett, at støðan er vandamikil, og mælt verður til eina munandi minking av fiskiskapinum. Er stovnurin væl fyri og tilgongdin av ungum fiski rímulig, verður bert víst á, hvør fiskiskapur av stovninum er skilabestur.

Fiskirannsóknarstovan savnar á hvørjum ári tilfar til stovnsmetingar í ICES. Hetta er veiða í tali eftir aldri, miðalvektir eftir aldri, kynsbúning eftir aldri, yvirlitstrolingar við Magnus Heinason (vár og heyst), gróðurkanningar, yngulkanningar og magakanningar og mangt annað. Hetta tilfar verður nýt at meta um støðuna í stovnunum og útlitini.

Smáir gýtingarstovnar

Fyri toskastovnarnar undir Føroyum metir ICES í ár, at gýtingarstovnarnir eru minni enn ráðiligt, og mælir til at støðga, ella hava so lítlan fiskiskap, sum praktiskt gjørligt.

Fyri hýsu verður mett, at hóast gýtingarstovnurin er rímuliga væl fyri, so hevur tilgongdin av ungari hýsu til stovnin í fleiri ár verið vánalig. Vandi er tí fyri at gýtingarstovnurin, sjálvt við ongum fiskiskapi, skjótt kemur undir tað nøgd, sum skal til fyri at geva eina miðal tilgongd. Tí er tilmæli fyri hýsu frá ICES tað sama, sum fyri tosk.

Um upsa undir Føroyum metir ICES, at stovnurin er væl fyri, men at fiskiskapurin er í harðara lagi, og mælir til at hesin verður minkaður við 20%.

Út frá hesum tilmælum hevur Fiskirannsóknarstovan gjørt sítt tilmæli til Landsstýrismannin í tilfeingismálum. Hetta er nógv umrøtt seinastu vikurnar, og kann lesast á heimasíðuni hjá Fiskirannsóknarstovuni www.frs.fo.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Redaktiónsleiðari: Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.